Fróðskaparsetur Føroya

7. september 2007

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 6/2007

| | |
|---|---|
| Tíð: | Fríggjadagin 7. september 2007, kl. 9-10-30 |
| Fundarstaður: | Setursskrivstovan |
| | |
| Á fundi: | Jóan Pauli Joensen, rektari<br>Elin Súsanna Jacobsen, vararektari og megindeildarráðsf. fyri SSD<br>Eivind Weyhe, megindeildarráðsf. fyri FMD<br>Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD<br>Annika Sølvará, setursskrivari |

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 5/2007 setursráðsfundi 29. juni 2007.**
   Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.**
   Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Fígging av umbygging/flyting í Jónas Broncks gøtu.** (J.nr. (3) 10-34-20070001 og (3) 10-12-20070002). *Fundarskjal: Yvirlit yvir játtan og nýtslu í Jónas Broncks gøtu pr. dags dato.* Rektarin hevur enn einaferð heitt á Mentamálaráðið um at arbeiða fyri eykajáttan til innrætting og innbúgv, umleið 200.000 kr. Mentamálaráðið hevur víst umbønini aftur. Setursskrivarin kunnaði um fíggjarstøðuna í løtuni, dags dato eru brúktar góðar 40.000 meira enn mett og okkurt kemur afturat. Setursráðið staðfesti, at tað týdningarmesta er at fáa hølini at virka sum skjótast. Fíggjarstøðan sum heild verður tikin upp á komandi setursráðsfundi.

4. **Samskipan av Granskingarverkætlanini fyri Økismenning við Fróðskaparsetrið.** (J.nr. (3) 10-03-20070005). Mentamálaráðið hevur tikið undir við tilmælinum frá Fróðskaparsetrinum og Granskingarverkætlanini fyri Økismenning. Samskipanin fær gildi frá 1. januar 2008. Setursskrivstovan og Søgu- og samfelagsdeildin taka sær av málinum.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Uppskot til løgtingslóg um at stovna partafelag, at byggja og at reka granskarapark - til hoyringar frá Vinnumálaráðnum.** (J.nr. (3) 10-00-20070003). Setursráðið hevur ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum vóru givnar í sambandi við hoyringina av uppskotinum hjá arbeiðsbólkinum. Setursskrivstovan svarar Vinnumálaráðnum.

6. **Skriv frá Mentamálaráðnum í sambandi við viðgerð og niðurstøðu ráðsins um kæru frá studenti.** (J.nr. (3) 10-03-20070003). Setursráðið fer á fundi í næstum at gera leiðreglur fyri samskifti millum starvsfólk og studentar. Setursskrivstovan fær tilfar til vega frá øðrum universitetum til íblástur.

7. **Ráðgevandi nevnd til Stuðulsstovnin. Áheitan frá Mentamálaráðnum um uppskot til limir og tiltakslimir.** (J.nr. (3) 10-01-20070011). Setursráðið samtykti at velja Anniku Sølvará, setursskrivara, aftur í nevndina. Sum tiltakslimur verður komandi kunningarfulltrúin skotin upp.

8. **Val av studentaumboðum til megindeildarráðini lestrarárið 2007/08.** (J.nr. (3) 10-01-20070009). Setursráðið heitir á limirnar í gomlu valnevndini um at halda fram og skipa fyri regluligum vali til megindeildarráðini sum skjótast.

9. **Nýtslurættur til J.C. Svabos gøtu 7.** (J.nr. (3) 10-39-20070001). Mentamálaráðið hevur formliga givið Fróðskaparsetrinum tilsøgn um at varðveita nýtslurættin til húsini í J.C. Svabos gøtu 7. Setursráðið tekur undir við ynskinum um at Landsbókasavnið brúkar bókasavnshølið til bøkurnar hjá Gudfrøði deildini og onnur søvn av bókum, sum ikki verða goymd undir hóskandi umstøðum í dag. Ovaru hæddirnar skulu brúkast til verkætlanarsettar granskarar styttri og longri tíð. Húsið treingir til ábøtur, hetta skal takast við í bygningssýnið fyri 2008. Setursskrivstovan avgreiðir málið.

10. **Móttøka í nýggjum hølum í Jónas Broncks gøtu / Lestrarársbyrjan 2007/08.** (J.nr. (3) 10-40-20070008). Seinni í september bjóðar Søgu- og samfelagsdeildin øllum starvsfólkum og studentum til felags morgunmat í Jónas Broncks gøtu. Seinni aftur fara Søgu- og samfelagsdeildin og Sjúkrarøktarfrøðiskúlin í felag at skipa fyri almennari móttøku í nýggju hølunum.

11. **Fundaætlan heyst 2007.** (J.nr. (3) 10-01-20070010). Fundirnir í heyst avtalaðir at verða 4. oktober, 8. november og 13. desember.

12. **Kunning frá deildunum o.ø.:**

a. **Fundur á Føroyamálsdeildini 28.8.07.** (J.nr. (3) 10-01-20070002). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

13. **Próvdómaragóðkenning. Eftir tilmæli frá Søgu- og Samfelagsdeildini hevur Mentamálaráðið góðkent Karin Jóhonnu Knudsen, cand.scient.soc., sum er í granskingarstarvi við Granskingardepilin fyri Økismenning, sum próvdómara í *Stjórnmálafrøði* og *Samfelagsfrøði*. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-25-20070001).
Staðfest.

14. **Rektarin hevur millum funda tilnevnt Boga Hansen, professara, sum umboð Fróðskaparsetursins í stýrisbólkin fyri norðurlendska samstarvið Nordic Master Marine Ecosystems and Climate. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-48-20070001).
Staðfest.

15. **Setursskrivarin hevur millum funda givið Paula í Sandagerði loyvi at nýta yrkingina *Heyst* hjá Janusi Djurhuus á eini komandi fløguútgávu. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-18-20070001).
Staðfest.

16. **Nevndin fyri *Grunn Johannesar og Gunhildar í Dalsgarði til frama fyri Fróðskaparsetur Føroya* hevur váttað fyri Gunnari Bjarnasyni og Lis E. Mortensen, at játtan frá 2002 til bókaútgávu stendur við. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-18-20070002).
Staðfest.

17. **Rektarin hevur millum funda tilnevnt Maluna Marnersdóttur, professara, dr.phil. sum umboð í Vísindaráðið undir Mentamálaráðnum. At staðfesta.** (J.nr. (3) 10-01-20070007).
Staðfest.

**Kunningarmál:**

**18. Mánaðarjavni ultimo juli 2007, nýtsla fyri alt setrið 10.168.400 kr = 51,5% av játtanarkarmi uppá 19.749.000 kr.** (J.nr. (3) 10-12-20070002).

**19. Frágreiðingar frá námsferðarstuðulsmóttakarum í ár** (J.nr. (3) 10-52-2007)**:**

a. **RUC-bólkurin:** *Homofobi på Færøerne? – en rapport om et samfunds holdningsændring i forbindelse med § 266 b.* **Próvtøkuverkætlan**
*b.* **Mariano González Campo, Spania:** *Report of research project in the Faroe Islands 2007*
*c.* **Nina Boel, Keypmannahavn:** *Præklinisk rapport fra Klaksvik*
*d.* **Vu An Do, Keypmannahavn:** *Præklinisk rapport. Klaksvik Sygehus 2007*

**20. Útgávur:**

a. **At lesa landið - Burðardygt hagabit, TemaNord 2006:589, Nordisk Ministerråd, Keypmannahavn 2007** (J.nr. (3) 10-18-20070002)
b. **Beretning 2007, Ríkisumboðsmaðurin í Føroyum**

c. **Grønlandsk kultur- og samfundsforskning 2004/05, Ilisimatusarfik/Forlaget Atuagkat, Nuuk 2006**
*d.* **Tilfar frá Dansk Center for Forskningsanalyse:** ***Ph.d.er i tal, forskeruddannelsesstatistik 2005-2006*** **og** ***Forskningens rolle i samfundet 1997-2007, fra AFSK til CFA.***
*e.* **Åbo Akademis årsberättelse 2006.**

Frágreiðing: Annika Sølvará